# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sveinaroyndin bíðar fyri framman

Leygarmorgunin samtykti Løgtingið fíggjarlógina fyri 2008. Tað vil siga, at stovnsleiðarar hjá tí almenna í dag, á fyrsta arbeiðsdegnum í juni mánað, høvdu møguleika at disponera út frá løgligu játtanini og harvið at halda uppat at reka stovnarnar við støði í provosoriskari fíggjarlóg. At árið var mest sum hálvrunnið, áðrenn fíggjarlógin fekst upp á pláss, líkist ongum. Neyvan nakar – politikarar ella onnur – eru ósamd við okkum í hesum.

Arbeiðið við fíggjarlógini hevur víst, at tað verður ikki bara bara hjá samgonguni. Áhugamálini eru nógv og so mikið kostnaðarmikil, at tað hevði ikki verið nakar trupulleiki at brúkt fleiri fíggjarlógir. Høvuðsgrundgevingin fyri einum valdømi var, at nú skuldu tingmenn síggja tingini frá í erva av. Tað skuldi vera liðugt við at draga egna línu. Um tað ber til við nýggjari vallóg at broyta menniskjaligu áhugamálini, man vera rættuliga ivasamt. Langa og drúgva fíggjarlógarviðgerðin hevur ikki sannført um, at nøkur broyting er at hóma.

Undir fíggjarlógarviðgerðini vóru tað fleiri - bæði úr samgongu og andstøðu - sum søgdu, at nú samtykta lógin er rættuliga átøk uppskotinum, sum undanfarna samgonga síðsta heyst legði fyri tingið. Kortini var orðaskiftið drúgvt og hart. Tað var ikki frítt, at fyrsta viðgerð av fíggjarlógini fyri 2009 var á skránni, og tað er í sambandi við ta lógina, at samgongan, landsstýrið, fíggjarmálaráðharrin og løgmaður rættuliga fara at fáa sína søk fyri.

Fíggjarlógaruppskotið skal leggjast fyri tingið fyri 1. oktober, og tey í Fíggjarmálaráðnum eru ivaleyst farin at fyrireika tað uppskotið. Vallyftini vóru nógv og gylt. Tey sóust verri enn so øll aftur í samtyktu fíggjarlóg. Tað bar til hjá samgonguni og tingmonnum at siga, at hesa ferð var tíðin knøpp, og at tað verður øðrvísi í 2009 lógini. Í samgonguskjalinum verður tosað um grundleggjandi reformar. Tilboðini innan undirvísing og gransking skulu økjast og víðkast, sjúkrahúsverkið skal lyftast, pensionistarnir skulu fáa betri kor, tunlar skulu borast og spreingjast, útoyggjarnar skulu fáa betri samband, kringvarpið og sjúkrakassarnir skulu á fíggjarlógina, og vit kundu hildið á.

Eingin flokkur er betri ella verri enn annar. Øll vita, at valstríð eru ikki ábyrgdarfull, og at tað verður lovað nógv meiri, enn tað ber til at fremja. Nú skulu løgmaður, landsstýrið, fíggjarmálaráðharrin og samgongan fáa tingini at ganga upp. Inntøkugrundarlagið er víkjandi, og tað krevur mót og áræði at fara undir at styrkja um inntøkugrundarlagið hjá landskassanum. Tað verður ikki hissini sveinaroynd, har pressan og harvið almenningurin eru skoðimeistarar.

**Sosialurin**

## Øll børn í forskúla tá ið tey eru seks ára gomul?

**JÓGVAN PHILBROW**
nevndarlimur í Føroya Pedagogfelag

Kjakið um tey seks ára gomlu er ikki sørt ørkymlandi og misvísandi. Fatanin ein fær av kjakinum er, at eingi skipaði viðurskifti eru fyri tey 6 ára gomlu. - Hetta er skeivt.

Flest øll seks ára gomul - t.e. eini 90-95%, hava sítt dagliga virksemi á dagstovnum ella dagrøkt. Á dagstovnunum kring landið hevur hesin aldursbólkurin, sum oftast, serliga støðu á stovninum. Skipað verður fyri "skúlabólki" ella líknandi. Hesir skúlabólkarnir hava í sínum virksemi tað skúlafyrireikandi arbeiðið um hendi, og er tað í flestu førum vælvirkandi.

Tað góða við hesari skipan er, at børnini framvegis sleppa at vera børn og skulu ikki náa enum ávísum "pensum".

Ein trupulleiki er helst, at dagstovnar verða kallaðir dagstovnar og hava ikki orðið skúli tengt at sær, tískil halda fólk kanska, at tey einki læra meðan tey ganga á stovni. Og tá skal sigast, at eingin námsfrøðingur við virðing fyri sær sjálvum, sínum arbeiði ella børnunum, ikki roynir at gera sítt til, at børnini verða so væl fyri sum gjørligt, tá tey fara í skúla.. Hetta verður gjørt við at stimbra teirra persónligu og sosialu førleikar.

Sum er, er skipanin tann, at børn skulu í skúla tá ið tey eru sjey ár. Skúlin tykist at hava trupulleikar og í staðin fyri at loysa teir trupulleikar, ið har eru, verður farið í holt við at broyta dagstovnaskipanina, ið tykist at virka. - Undarligt í mínari verð –

Fyrsta stigið, áðrenn farið verður í holt við forskúlar, eigur tí at verða at bøta um viðurskiftini hjá børnunum og skúlanum tey fyrstu skúlaárini. Aðrastaðni rundan um okkum, eru tey farin í holt við at seta tvílæraraskipanir og líknandi í verk, og er spurningurin, um hetta ikki eigur at verða viðgjørt nærri í Føroyum.

Sjálvandi kann eitt meira miðvíst fyrireikandi arbeiðið fara fram á dagstovnunum, og er tað eisini byrjað sambært kunngerð til Dagstovnalógina í 2006, har tað stendur: § 3. Dagstovnurin eigur at seta orð á, hvørji námsfrøðilig mál eiga at vera nádd fyri hvønn aldursbólk av børnum, og hvussu hetta skal setast í verk.

Henda kunngerð er so mikið nýggj, at ikki ber til, at siga hvørja ávirkan hon hevur havt enn, tó er tað vælhugsandi, at hetta fer at gera dagstovnaarbeiðið sjónligari og miðvísari. Mentamálaráðið hevur sett nakrar royndarbólkar, ið skulu gera námsætlanir fyri m.a. dagstovnaøkið.

Hetta sigur mær so mikið, at forskúlarnir tola væl at bíða, tí enn restar ein lýsing um, hvat innihaldið á einum dagstovni eigur at vera, og hvussu hetta arbeiði skal skipast. Tí, sum tað ljóðar, skulu færri fólk vera um hesi seks ára gomlu í einum forskúla enn á einum dagstovni. Tá ljóðar hetta meira sum ein sparing, enn sum ein roynd, at skipa viðurskiftini betur fyri henda aldursbólk. Eg dugi eisini at síggja, at foreldragjaldið á dagstovnum, eisini kann verða viðvirkandi til, at foreldur heldur vilja, at børnini skulu í forskúla enn á dagstovn, tá hetta fyri tey verður ein bíligari loysn. Enn havi eg so ikki hoyrt nakað um ein kostnað fyri forskúlan.

"Hastverk er lastverk" er eitt hugtak, ið rennur mær í hug.

## Viðmerking til innslag í degi og viku 30. mai 2008, um míni starvsviðurskifti

**SIGURÐ Í JÁKUPSSTOVU**



Eg fari við hesum at gera mínar viðmerkingar til innslagið í degi og viku 30 mai, fyri at greiða nærri frá teimum viðurskiftum, sum umrødd vóru í sendingini.

Á heysti í fjør søkti eg um, og fekk 2 ára farloyvi frá stjórastarvinum á Jarðfeingi, av tí at eg fór til Íslands at búgva. Í tíðini eftir 1. november, havi eg virkað sum ráðgevi fyri Jarðfeingi innan ávís arbeiðsøki. Hesar arbeiðsuppgávur eru sum frálíður minkaðar munandi, antin tí tær eru lidnar ella broyttar, og eru nú steðgaðar. Eg havi starvast útvið 5 ár á Jarðfeingi við spennandi avbjóðingum og saman við dugnaligum starvsfólkum.

Í mai mánaði havi eg tikið við sum tøkniligur leiðari á Atlantic Petroleum í sambandi við at oljuleiðir, sum felagið er partur av í bretskum øki, koma í framleiðslu.

Tá tað í innslagnum verður sagt at "vitanin hjá Jarðfeingi nú liggur í privatum oljufelag", er hetta skotið langt við síðuna av og púra skeivt. Dátur og frágreiðingar frá oljufeløgum til Jarðfeingi eru ógvuliga rúgvismiklar og torskiltar av tí at hesar fevna um nógv ymisk og høgt specialiseraði fakøki, - og flytast tí ikki við mær. Harumframt eru upplýsingar, sum Jarðfeingi fær frá oljufeløgum, heftar við trúnaðarskyldu og hesari eri eg eisini fevndur av.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.